Kunngerðablaðið A

2021

Givið út 10. mai 2021

Nr. 72

5. mai 2021

Løgtingslóg
um
Búskaparráð

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1. Búskaparráðið fylgir við búskaparligum viðurskiftum í landinum og kemur við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina.

§ 2. Landsbankanevndin, sbr. § 2 í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, er Búskaparráðið.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nevndarsamsýningarnar.

§ 3. Búskaparráðið ger árliga tvær konjunkturfrágreiðingar, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september.

Stk. 2. Búskaparráðið kann harumframt gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

§ 4. Landsbankin røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

§ 5. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð.

Í Tinganesi, 5. mai 2021

Bárður á Steig Nielsen (sign.)
løgmaður

Lm. nr. 97/2020